# Esmar: Poul á Oyri var óførur

**Vit hava nú seinna partin av frásøgnini hjá Esmar Dahl, har vit fáa meira at vita um Oyri. Vit koma eisini at síggja meira av hansara modellarbeiði**

## Oyri

Oyri er tann gamla bygdin i hesum øki. Hon hevur søgu heilt aftur til 1300 talið. Hetta er eisini bóndabygdin í økinum, sum eisini hevur fostrað ein løgmann í gamlari tíð, nevniliga Hans Jacobsen Debes. Freydis Poulsen hevur greitt nærri frá Oyra søgu í jólablaðnum Birting fyri 2003.

Bygdin hevur fram til farnu øld verið lítil. Í 1801 vóru sambært fólkateljingini bert tvey hús, men síðan hevur hon ment seg væl.

Esmar er sonur Jógvan Dahl, f. 1878, sum giftist við Atu Poulsen úr Hósvík. Tey fingu átta børn.

## Tey vóru:

**Inga**, f. 1910, ógift.

**Hans Andreas**, f. 1913. Giftist við Malenu úr Beitinum, búðu í Toftum. Hans Andreas var borin til festið í húsinum. Hann hevði ikki heilsu at taka við hesum. Tískil fór festið til Óla. Hans Andrea starvaðist hjá Højgaard fyritøkuni á Toftum og var eisini eitt skifti nevndarlimur í Føroya Reiðarafelag og kendur sum eina skilamaður.

**Ole** f. 1915. Giftist við Jóhonnu Sofíu Thomassen úr Kvívík.

**Hjalgrim** f. 1916. Gekk burtur við Doru í 1931.

**Sara** f. 1917, giftist við Thorvald Bjerring í Ærøskøbing.

**Esmar** f. 1920 giftist við Jonu Samuelsen, sum var úr Vík, og tey fingu trý børn.

**Elijana**, f. 1921, gift við Óla Debes.

**Aksel**, f. 1925, giftur við Kristinu Andreassen av Oyrabakka. Foreldur hennara flutti úr Tjørnuvík til Oyrabakka í 1928.

Av hesum eru Hans Andreas, Óli og Hjallgrim deyðir.

## Poul á Oyri

Ein týðandi partur av bygdarlívinum á Oyri var handilin hjá O. C. Joensen. Upprunin til hesa fyritøku er Ole Christian Joensen (1860-1928), sum í 1898 giftist við Siggu Sofíu Johansen, f. 1873, av Eiði.

Óla Christian hevði eitt festi. Hann fekk sær eisini handil og hevði postavgreiðsluna á Oyri.

Tey fingu seks børn. Tá ið Óla Kristian doyði í 1928 tók Jógvan, eldri sonurin, við postavgreiðsluni og festinum.

Poul helt áfram við handlinum hjá pápanum og bygdi sethús við krambúð niðri móti sjónum, har hann eisini tók við avgreiðsluni hjá mjólkabátunum, Tróndi og Streymi.

Alt hetta skapti nógv virksemi. Nógv fólk kom í handilin, og tey góvu sær altíð góða tíð. Her var altíð okkurt at frætta.

Hetta var ikki minst galdandi fyri avgreiðsluna av mjólkarbátunum. Ferðaætlanin var sera óneyv, og tí kom fólk altíð í sera góðari tíð, tá ið tey skuldu til Havnar, og tað kundi vera leingi at bíða.

Og hvat annað var at gera enn at bíða inni í køkinum hjá Hansinu, konu Poul. Hon var ættað úr Haldarsvík, fødd Samuelsen. Hon var systir Jonu, konu Esmar. Tær vóru døtur Hans í Nýggjustovu og Elsebeth Mariu, sum var ættað av Oyri, og sum var tiltikin sum skilafólk. Hon gekk til konur, sum skuldu eiga. Tað var ikki altíð, at jarðarmóður var tøk, og tí kom hon at taka ímóti nógvum børnum. Petur Reinert, sum var lækni har á leiðini, plagdi at taka til Elsebeth Mariu sum eitt skilafólk, sum hann kundi føla seg tryggan við.

Hansina var tiltikin fyri at vera blíð, so sum Tórhallur eisini tekur til. So øll fingu ein drekkamunn, meðan tey bíðaðu. Hetta tekur Freydis eisini til í síni frásøgn um Oyri.



Esmar sigldi við Guiding Star inntil kríggið. Grundað á manningarlistanum fyri 1938, og eina mynd av manningini, har hon stendur við snøri, hevur Esmar sett nummur á, so tað bæði sæst hvar á skipinum, hvør maður hevur staðið við snøri og hvørja koyggju hvør av monnunum hevur havt. Hetta minnist hann framvegis!

## Poul fer at keypa sild

Poul hevði eisini eitt munandi vinnuligt virksemi. Áðrenn hansara tíð hevði sildin avmarkaðan týdning á Oyri, tí tað slapst illa av við hana uttan til agn og heimabrúk.

Men Poul fór at keypa sild til saltingar í 1933. Sildin varð geld, sum tað verður kallað, eitt slag av bløðging við einum serligum saksi. Síðan varð sildin saltað í tunnur og so útflutt. Tað vóru serliga tey smærru farmaskipini hjá Skipafelagnum, sum til dømis Rókur, sum komu eftir sildini. Sildasaltingin fór fram í kjallaranum hjá O. C. Joensen, og her munnu ofta hava verið nógvar tunnur á havnarlagnum. Seinni tóku teir annað virksemi upp.

Teir pakkaðu sild frá garnaskipum, sum saltaðu umborð. Teir vóru framburðsmen við veiðu og virking av jákupsskel. Seinni fingu teir Rækjuvirkið, sum alt hevur givið nógv arbeiði á plássinum, sjálvt um hesar vinnur sum aðrar í fiskivinnuni hava gingið upp og niður.

## Lýsibræðing

Teir hjá O. C. Joensen fingu sær eisini lýsismeltarí undir krígnum. Esmar var við til at sigla til bygdirnar nærindis við maskinbáti at keypa livur frá bátunum, sum róðu út og avreiddu til skipini,



Esmar Dahl er ættaður úr húsinum Norð í Stovu. Hetta er eitt av húsunum, sum Esmar hevur gjørt modell av. Hann hevur í minsta smálut gjørt gjørt hvørja hædd fyri seg, har sjálvt náttpottarnir standa undir seingini. Tá hæddirnar eru settar saman, sæst hvussu húsini sóðu út uttani frá. Sigast kann stutt, at hetta er eitt framúr avrik.
Hetta er ovasta hædd



Hetta er miðhæddin



Her síggja vit kjallaran við neytunum á básunum